# Kaupthing – ein altjóða fyritøka í Føroyum

Kaupthing er ein av norður-evropeisku bankunum, sum bjóðar eina fjøltáttaða fíggjarliga tænastu til fyritøkur, íverksetarar og einstaklingar. Kaupthing virkar í 10 ymiskum londum, m.a. øllum teimum norðurlendsku londunum, Luksenburg, Sveis, Onglandi og USA. Bankin hevur høvuðssæti í Íslandi. Í løtuni er Kaupthing Bankin er tann 8. størsti í norðanlondum, og hevur umleið 2400 starvsfólk runt um í heiminum. Javnin hjá Kaupthing javnvigar við £34 milliardum.

Kaupthing Virðisbrævameklarafelag pf. er í dag á odda innan fyri ráðgeving og handil við virðisbrøvum í Føroyum. Kaupthing var ein av teimum, ið stovnaðu føroyska virðisbrævamarknaðin, sum síðan stovnan hevur staðið aftan fyri nógv ymisk frambrot í føroyska fíggjarheiminum. Kaupthing tók somuleiðis stig til at stovna fyrsta privata framtaksfelagið í Føroyum, Notio Framtaksfelag pf., sum Kaupthing umsitur. Harumframt tók Kaupthing stig til at stovna pf. Fastogn.

Í dag virkað Kaupthing innan hesi øki:

- Vinnutænastur
- Vinnulán
- Ognarrøkt
- Virðisbrævahandil

## Vinnuráðstevnan

Í samband við vinnuráðstevnuna, sum verður í døgunum 5. til 7. apríl, fingu vit eitt prát við Petur Holm, stjóra á Kauthing Føroyar.

“Kaupthing Føroyar er ein partur av einari størari fyritøku, og hetta gevur okkum eina stóra fíggjarliga orku”, sigur Petur Holm. “Vit eru før fyri at luttaka í stórum verkætlanum, tí at vit hava hesa stóra fyritøku í rygginum. Tað sæst eisini aftur, tí um vit hyggja eftir teimum stóru transaktiónum sum hava verið í seinastuni, sæst at vit hava verið við í teimum flestu. T.d. vóru vit við í sølunum av Vesturvón, Fiskavirking, Tórshavnar Skipasmiðju og Kall”, sigur Petur Holm.

Eisini hava Kaupthing verið at síggja í smærri verkætlanum. So sum við sponsoravtaluna við Helga Dam Ziska. “Tað passar ógvuliga væl inn í politikkin hjá okkum at gera eina slíka avtalu við Helga. Vit meta, at hann er størsta talentið í føroyskum ítrótti í løtuni, og hann er ein ógvuliga miðvísur ungur maður, ið satsar upp á sína ítrótt”, segði Petur í samband við hesa sponsoravtalu.

## Ein globalan hugburð

“Her í Kaupthing Føroyar leggja vit okkum at hava ein globalan hugburð. Vit eru partur av eini størri fyritøku sum arbeiðir í 10 londum”.

“Á komandi vinnuráðstevnuni vilja vit gjarna hitta møguligar kundar. Vit vilja hitta fyritøkur sum vit kunnu samstarva við – bæði her í Føroyum og í Íslandi”, greiður Petur Holm frá. “Hetta er eitt upplagt høvið at hitta umboð fyri tílíkar fyritøkur, og tí vilja vit sjálvandi luttaka á ráðstevnuni”.



*Petur Holm, stjóri í Kaupthing Føroyum*





.Net-menningarfólk

- ☑ Dámar tær at hava ábyrgd og at arbeiða sjálvstøðugt?
- ☑ Hevur tú áræði og hug at læra meira?
- ☑ Dugir tú at menna og læra frá tær?
- ☑ Dámar tær eins væl arkitektur og teknik?
- ☑ Kennir tú væl .NET ?
- ☑ Hevur tú royndir við C#, Visual Basic ella Java?
- ☑ Og royndir við menning av WEB-skipanum?
- ☑ Hevur tú holla útbúgving innan kunningartøkni?

Svarar tú ja til nakrar av hesum spurningum, ert tú møguliga tann, vit hava brúk fyri á Elektron!

Tú skalt arbeiða í ymiskum verkætlanum og luttaka í okkara .Net-menningarbólki. Bólkurin hevur m.a. ábyrgd av menningartólunum, menningarumhvørvinum, arkitekturi og standardum.

Umhvørvið er heterogent, og vit eru í holt við at byggja nýmótans loysnir - ið byggja á SOA-arkitektur, har .NET er ein av okkara strategisku platformum. Arbeiðsumhvørvið er líkatil, innovativt, hjálpsamt, krevjandi og við hvørt rokaligt. Kortini er pláss fyri persónligari og fakligari menning.

Fleiri upplýsingar:
Ring til Robert Vilhelmsen á telefon 345100 ella 545108 og fáa meira at vita um tínar møguleikar á Elektron.

Send skrivliga umsókn til P/F Elektron ella við telduposti til ulla@elektron.fo, innan 18. apríl.

Vit gleða okkum at frætta frá tær!

Elektron

Staravegur 9 · P.O. BOX 3219
FO-110 Tórshavn
Tel.: +298 34 51 00 · fax: +298 34 51 01
e-mail: info@elektron.fo

Stephanssons Hús